# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24. jan. 2023 |
| Mál nr.: | 22/18081-1 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 24. jan.-22. febr. 2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**grundvatn**

*Virkisøki og allýsingar*

**§ 1**. Grundvatn er ráevni í undirgrundini og tí ogn landsins.
*Stk. 2.* Grundvatn er vatn, sum situr í rivum, fláamørkum og opum í undirgrundini í mettaða beltinum.
*Stk. 3.* Grundvatn skal verjast móti dálking og øðrum inntrivum, sum kunnu minka um vatngóðskuna.
*Stk. 4.* Øll gagnnýtsla av grundvatni skal vera burðardygg, og landið kann seta forboð fyri gagnnýtslu, sum annars er heimilað eftir hesi lóg, um mett verður, at ætlaða ella framhaldandi nýtslan ikki er burðardygg.

*Loyvisveitan*

**§ 2.** Um grundvatn rennur upp av sær sjálvum á einum grundstykki, kann eigarin av grundstykkinum gagnnýta vatnið í egnum húsarhaldi, um vatnið hóskar til ætlaðu nýtsluna, og um loyvi er fingið til tess, sbr. stk. 2.
*Stk. 2.* Landið og síðani avvarðandi kommuna hava framíhjárætt at brúka vatn, fevnt av ásetingini í stk. 1, og loyvið eftir stk. 1 er tískil treytað av, at landið ella kommunan ikki skal brúka vatnið til endamál, fevnd av § 3.
*Stk. 3.* Loyvi eftir stk. 1 kunnu ikki latast ella seljast øðrum.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin kann veita kommunum loyvi at gagnnýta grundvatn til ta kommunalu vatnveitingina, til orkuveiting o.o. almannagagnlig endamál.
*Stk. 2.* Loyvi eftir stk. 1 kunnu ikki latast ella seljast øðrum.

**§ 4**. Landsstýrismaðurin kann veita loyvi til vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni, sum rennur í ella sum kann vinnast burtur úr undirgrundini, tá alment er lýst eftir umsóknum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann somuleiðis veita virkjum og fyritøkum loyvi at gagnnýta grundvatn á egnum ella leigaðum grundstykki, um vatnið skal brúkast til ta vinnuligu framleiðsluna hjá virkinum ella fyritøkuni. Loyvi verður latið eftir umsókn.
*Stk. 3.* Treytað av, at vatnnøgdin er nóg stór, kunnu fleiri loyvi latast til somu keldu ella grundvatnsgoymslu.

*Stk. 4.* Loyvi til vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni kann bara latast smápartafelag ella partafelag, sum er skrásett hjá Skráseting Føroya ella sum er fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan, og sum hevur høvuðssæti í Føroyum.

*Treytir*

**§ 5**. Tá loyvi eftir § 4, stk. 1-2, verður latið, skal dentur leggjast á, at vatnið verður gagnnýtt á skynsaman hátt, og at umsøkjarin hevur neyðugan fíggjarligan og tøkniligan førleika at fremja ætlanina.
*Stk. 2.* Við loyvum eftir § 4, stk. 1-2, kunnu leggjast treytir um kanningar, frágreiðingar og upplýsingarskyldu loyvishava, treytir um uppseting og burturbeining av útbúnaði, treytir um burturbeining av avlopsvatni, treytir um, nær loyvishavi kann fara undir at gagnnýta vatnið o.a.
*Stk. 3.* Loyvi eftir § 4, stk. 1-2, kann eftir umstøðunum verða avmarkað og treytað, og sleppur ikki loyvishava undan at fáa til vegar øll onnur loyvi, ið eru kravd eftir aðrari lóggávu.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta gjald fyri loyvi at gagnnýta grundvatn.

*Afturtøka*

**§ 6**. Loyvi eftir § 4, stk. 1-2, kann takast aftur, um tað ikki verður brúkt 12 mánaðir á rað, ella um ásetingarnar í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, ella treytir í loyvinum sjálvum ikki verða hildnar.

**§ 7**. Loyvi eftir § 4, stk. 1-2, kann bara latast ella seljast øðrum, um landsstýrismaðurin frammanundan hevur góðkent hetta.
*Stk. 2.* Treytirnar í § 5 galda á sama hátt fyri avhendingar eftir § 7, stk. 1.

*Gildistíð*

**§ 8**. Loyvið eftir § 2, § 3 ella § 4 verður latið fyrstu ferð fyri í mesta lagi 20 ár. Síðani kann loyvið verða longt upp í 5 ár í senn.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 6 eru galdandi uttan mun til loyvistíðarskeið.

*Smærri útbúnaður*

**§ 9**. Útbúnaður til tess at gagnnýta grundvatn kann setast upp á privatum grundstykki uttan endurgjald, um tað kann gerast uttan stórvegis ampa fyri eigaran.
*Stk. 2.* Tann, sum skal seta upp útbúnaðin, nevndur í stk. 1, hevur heimild at gera neyðugar fyrireikandi uppmátingar, annað tøkniligt fyrireikingararbeiði og aðrar kanningar.
*Stk. 3.* Endurrindað verður fyri skaðar, ið standast av arbeiðinum. Fæst ikki semja um endurgjaldið, ásetur Jarðfeingi upphæddina. Avgerðin hjá Jarðfeingi kann kærast til landsstýrismannin.
*Stk. 4.* Eigarin skal hava boð um arbeiðið 4 vikur undan, at arbeiðið byrjar.
*Stk. 5.* Í seinasta lagi 2 vikur undan, at arbeiðið skal byrja, kann eigarin mótmæla og grundgeva fyri, at ætlanin eigur at verða viðgjørd sum ognartøka eftir § 10.

*Ognartøka*

**§ 10.** Tá ið almannagagnið krevur tað, verður landsstýrismanninum heimilað, móti fullum endurgjaldi, at ognartaka lendi til útbúnað o.a., sum er neyðugt fyri at gagnnýta grundvatn.
*Stk. 2.* Farið verður fram eftir reglunum í Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.

*Heimildir og kæra*

**§ 11.** Landsstýrismaðurin kann leggja heimildir sínar eftir hesi løgtingslóg til stovn undir landsstýrinum.
*Stk. 2.* Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir lógini til annan myndugleika undir ráðnum, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um rættin at kæra um avgerðir myndugleikans, m.a. at avgerðirnar ikki kunnu leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika, og um rættin hjá myndugleikunum at taka upp aftur eitt mál, eftir at kæra er komin inn.

*Revsing*

**§ 12**. Tann, ið tilvitað tekur burtur, avlagar ella løstar merkingar o.a., sum verður gjørt í sambandi við arbeiði, nevnt í § 9, verður revsaður við sekt, um ikki strangari revsing er uppiborin eftir revsilógini.

*Skiftisreglur og gildiskoma*

**§ 13**. Um loyvishavi, sum við heimild í løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum, hevur fingið loyvi at gagnnýta vatnið úr bergholinum, søkir um at leingja loyvistíðarskeiðið, skal umsóknin viðgerast eftir reglunum í hesi løgtingslógini.

**§ 14**. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2*. Tá øll loyvi, ið eru givin við heimild í løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum, eru endurnýggjað, latin inn aftur ella tikin aftur, verður løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum sett úr gildi við kunngerð landsstýrismansins.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
**1.1. Orsakir til uppskotið**
Higartil hava møguleikarnir at útvinna ella á annan hátt at gagnnýta grundvatn í Føroyum verið lítið kannaðir. Ein orsøk er óivað tann, at undirgrundin er bygd upp av basaltfláum, sum gera tað trupult at fáa fatur á vatninum. Kortini hevur kelduvatn, sum er grundvatn, ið spríkir úr undirgrundini, leingi verið brúkt sum vatnveiting til bygdir kring landið, og fólk hava vitað um heitar keldur í øldir.

Tunlarnir, sum eru gjørdir í Føroyum, hava eisini avdúkað, at tað er hópin av vatni í undirgrundini. Vatn rennur inn í tunlarnar gjøgnum rivur og leyst grýti, og neyðugt er at leiða vatnið burtur. Síðan farið varð undir jarðhitaboringar í Føroyum fyri eini 15 árum síðani, eru fleiri enn 1000 jarðhitahol borað. Í fleiri førum rennur mongd av vatni í hesum boringum, so eisini í grunnu undirgrundini í bygdum øki er nógv vatn.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Síðani málsøkið *ráevni í undirgrundini* varð yvirtikið í 1992, hevur landið havt ræði á allari gagnnýtslu av hesum ráevnum. Ráevni í undirgrundini fevna ikki bara um olju, men eisini um grundvatn og onnur ráevni, ið kunnu vinnast úr henni. Hitin í grundvatninum, sum kann brúkast til orkuendamál, er eisini fevndur av hugtakinum *ráevni í undirgrundini*, sbr. løgtingslóg um jarðhitaskipanir (løgtingslóg um el-riknar hitapumpuskipanir). Harumframt er gagnnýtsla av vatninum í sumbiarbergholinum skipað við løgtingslóg frá 2000. Tann lógin er í ávísan mun grundarlag undir hesum uppskoti.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Løgtingslógin hevur til endamáls at fáa til vegar greiðar reglur um, hvussu loyvi kann veitast at gagnnýta grundvatn.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Víst verður til pkt. 1.1.-1.3. omanfyri

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið er sent til hoyringar hjá Kommunufelagnum, Skráseting Føroya, Sumbiar kommunu, Sp/f Kirvi, Sp/f Nomi Water og P/F Føroya Bjór, umframt stjórnarráðunum.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til ummælis á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og á almenna hoyringarportalinum hjá landsstýrinum í tíðarskeiðinum 24. januar-22. februar 2023.

Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar (verður skrivað, tá hoyringarfreistin er farin).

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**
**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí heimild er at taka gjald fyri loyvisviðgerðina, eins og heimild er at taka gjald fyri loyvi at gagnnýta grundvatn.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið, tí mett verður, at tað ber til hjá Jarðfeingi at seta í verk og umsita eina loyvisskipan við verandi starvsfólkamegi.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið hevur fyri vinnuna ta avleiðing, at greiðar reglur verða settar fyri vinnuligari gagnnýtslu av grundvatni í Føroyum.

Harumframt verður ásett, at landsstýrismaðurin kann taka gjald fyri at veita loyvi at gagnnýta grundvatn.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Lógaruppskotið verður í fyrstu syftu ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

Í hesum sambandi skal kortini gerast vart við, at um gagnnýtslan av vatninum verður so stór, at grundvatnið fer at ganga undan ella stórliga minkar, verður talan um umhvørvisavleiðingar, sum hava við sær, at stig eiga at verða tikin. Ein avleiðing kann verða, at vinnulig gagnnýtsla av grundvatninum má skerjast ella halda uppat.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørlse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**

Ongar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Ásett verður, at tann, ið tilvitað tekur burtur, avlagar ella løstar merkingar o.a., sum verður gjørt í sambandi við arbeiði at gagnnýta grundvatn, verður revsaður við sekt, um ikki strangari revsing er uppiborin eftir revsilógini.

Um almannagagnið krevur tað, kann landsstýrismaðurin, móti fullum endurgjaldi, ognartaka lendi til tess at gagnnýta grundvatn. Slík ognartøka skal fremjast eftir reglunum í Lov nr. 69

af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar og skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann taka gjald fyri at veita loyvi. Talan kann bæði vera um gjald fyri at viðgera umsóknir og gjald fyri at brúka grundvatnið.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Tá ið loyvi at gagnnýta grundvatn verður latið, kunnu tað í loyvinum verða ásettar treytir um kanningar, frágreiðingar og upplýsingarskyldu, eins og treytir kunnu verða ásettar um m.a. uppseting og burturbeining av útbúnaði. Harumframt kunnu verða ásettar treytir um, nær loyvishavi kann fara undir at gagnnýta vatnið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at veita loyvi at gagnnýta grundvatnið, sum rennur í ella sum kann vinnast burtur úr undirgrundini, og at leggja treytir við slíkum loyvum. Harumframt gevur lógaruppskotið landsstýrismanninum heimild at krevja gjald fyri slík loyvi.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur almennum myndugleikum atgongd til privata ogn, tá endamálið er at seta upp útbúnað til tess at gagnnýta grundvatn. Harumframt hava almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, um tað er neyðugt at gera fyrireikandi uppmátingar, annað tøkniligt fyrireikingararbeiði og aðrar kanningar.

Aðramáta gevur lógaruppskotið ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

***Til § 1***
Staðfest verður, at grundvatnið er ráevni í undirgrundini, og tí ogn landsins, sbr. lov nr. 181 frá 8. mai 1950 om efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund.

Ásett verður, at løgtingslógin einans fevnir um grundvatn. Heitið *grundvatn* fevnir um tað vatn, sum situr niðri í tí mettaða beltinum í grótinum í undirgrundini. Mettaða beltið er økið undir grundvatnskorpuni, har tómrúm eru full av vatni, øvut av økinum uppi yvir grundvatnsskorpuni, har tómrúm ikki eru full av vatni. Tómrúmini, sum víst verður til, eru rivur og poknur í grótinum, ið kunnu fyllast við vatni. Grót, sum inniheldur vatn, nevnist ein grundvatnsgoymsla. Grundvatn rennur út á yvirflatuna á ymsan hátt, m.a. gjøgnum keldur, t.d. í Varmakeldu í Fuglafirði. Omanávatn er vatn, sum rennur í eitt nú áum, vøtnum, rørleiðingum og drenrørum, og er ikki fevnt av lógini.

Ásett verður, at grundvatn skal verjast móti dálking og øðrum inntrivum, sum kunnu minka um vatngóðskuna.

At enda verður ásett, at øll gagnnýtsla av grundvatni skal vera burðardygg, og at landið kann seta forboð fyri gagnnýtslu, sum annars er heimilað eftir hesi lóg, um mett verður, at ætlaða ella framhaldandi nýtslan ikki er burðardygg. Endamálið er at tryggjað, at ovurnýtsla ikki kemur fyri, tí ovurnýtsla kann skeikla vatnjavnvágina, økja dálkingina av grundvatninum og tøma goymslurnar. Øll fyrisiting av grundvatninum skal virða hesa fyrivarnisreglu. Henda áseting verður rokkin við at seta krøv til útbúnað, evni o.a. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

**Til § 2**
Ásett verður, at rennur grundvatn upp av sær sjálvum á einum grundstykki, kann eigarin av grundstykkinum gagnnýta vatnið í egnum húsarhaldi. Hetta er kortini treytað av, at loyvi er fingið til tess, og at landið ella avvarðandi kommuna ikki skal brúka vatnið til almannagagnlig endamál, t.d. vatnveiting ella orkuframleiðslu. Sostatt hava bæði landið og kommunan framíhjárætt at brúka vatnið, áðrenn eigarin kann brúka tað.

Framíhjárætturin hjá landinum og síðani kommununi fevnir eisini um rættin at brúka vatnið, tá ið tann, sum eigur grundstykkið, har vatnið rennur upp, hevur brúkt tað.

Loyvið at brúka vatn, sum rennur upp á egnum grundstykki, er sostatt m.a. treytað av, at landið ella avvarðandi kommuna ikki skal brúka vatnið, at landið ella kommunan kann brúka vatnið aftaná, at tann, sum eigur grundstykkið, hevur brúkt tað, og at vatnið hóskar til ætlaðu

nýtsluna. Eftir umstøðunum kunnu aðrar treytir verða lagdar við einum loyvi at gagnnýta vatn eftir hesi áseting, sbr. ásetingarnar í §§ 4-6 og § 8.

Loyvi at gagnnýta vatn eftir hesi áseting fevnir ikki um sølu ella aðra vinnuliga nýtslu av vatninum.

Talan er bara um vatn, sum rennur upp av sær sjálvum, t.d. sum kelda, ella vatn, sum rennur upp, tí annað inntriv, t.d. jarðhitahol, er borað á ognini. Sostatt er tað ikki loyvt privatum at bora eftir vatni til egið brúkt.

**Til § 3**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin kann veita kommunum loyvi at gagnnýta grundvatn til ta kommunalu vatnveitingina, til orkuframleiðslu og onnur almannagagnlig endamál. Treytirnar í § 2, stk. 2, galda á sama hátt fyri loyvi, veitt eftir hesi áseting, og landið hevur tískil framíhjárætt at brúka vatnið. Tað er kortini einki sum forðar fyri, at bæði land og kommuna brúka vatn úr somu keldu, um vatnmongdin er nóg stór.

Loyvi at gagnnýta vatn eftir hesi áseting fevnir ikki um sølu ella aðra vinnuliga nýtslu av vatninum.

**Til § 4**
Landsstýrismaðurin fær heimild at veita loyvi til at gagnnýta vatnið í undirgrundini í avmarkaða tíð. Talan er her um vinnuliga gagnnýtslu, eitt nú til orkuframleiðslu, til matvøruframleiðslu, til drekkivatn at selja í fløsku o.tíl. Loyvi verður latið, tá ið alment er lýst eftir umsóknum. Treytað av, at vatnnøgdin er nóg stór, kunnu fleiri loyvi latast til somu keldu ella grundvatnsgoymslu.

Landsstýrismaðurin fær í stk. 2 somuleiðis heimild at veita loyvi til vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni, sum kann vinnast burtur úr undirgrundini, tá ætlanin er at fáa til vegar vatn til vinnuliga framleiðslu. Talan kann eisini vera um at gagnnýta hitan úr grundvatninum.

Tá talan er um loyvi eftir stk. 2 er støðan tann, at virki ella fyritøkur bora eftir vatni, sum skal brúkast til ta framleiðsluna, sum virki ella fyritøkan fæst við, t.d. smoltaling ella fiskavirking. Í hesum førum verður ikki alment lýst eftir umsóknum, um borað verður á egnum øki ella á øki, sum er langtíðarleigað frá eini kommunu. Er talan um leigað øki, krevst loyvi frá eigaranum. Loyvi eftir stk. 2 fevnir bara um vatn til tann tørv, sum virki ella fyritøkan hevur. Um loyvi er fingið at gagnnýta grundvatn til t.d. virking av fiski, ber til til – við sama loyvi – at fara undir at framleiða og selja kelduvatn í fløsku. Í slíkum førum krevst eitt annað loyvi eftir stk. 1, sbr. stk. 3, og tá verður alment lýst eftir umsóknum.

Staðfest verður, at er vatnnøgdin størri enn tað, sum virkið ella fyritøkan skal brúka, kann landsstýrismaðurin lata fleiri loyvi til somu keldu, hóast tað er eitt virki ella ein fyritøka, sum hevur borað eftir vatni til egna nýtslu, sbr. omanfyri.

Ásett verður, at loyvi til vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni bara kann latast smápartafelag ella partafelag, sum er skrásett hjá Skráseting Føroya ella sum er fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan, og sum hevur høvuðssæti í Føroyum.

Henda avmarking er grundað á, at talan er um virksemi, sum krevur serligt loyvi, tí tað almenna hevur tørv á at fylgja við, hvussu støðan er við grundvatninum. Í mun til ábyrgd og møguligt endurgjald fyri skaða er eisini umráðandi at kenna eigaraviðurskiftini.

**Til § 5**
Tá loyvi at gagnnýta grundvatn verður latið, skal dentur leggjast á, at vatnið verður gagnnýtt á skynsaman hátt, og at umsøkjarin hevur neyðugan fíggjarligan og tøkniligan førleika at fremja ætlanina.

Tað er myndugleikin, ið ger av, hvussu vatnið best verður gagnnýtt, eins og tað er myndugleikin, sum metir um førleikarnar. Førleikar, ið kunnu hava týdning fyri metingina, eru m.a. tøkniligir, fíggjarligir og umsitingarligir førleikar.

Við loyvum at gagnnýta grundvatn kunnu leggjast treytir um kanningar, frágreiðingar og upplýsingarskyldu loyvishava, treytir um uppseting og burturbeining av útbúnaði, treytir um hóskandi burturbeining av avlopsvatni, og treytir um, nær loyvishavin kann fara undir at gagnnýta vatnið. Aðrar treytir kunnu eisini leggjast við loyvinum, t.d. at loyvið er avmarkað til ávísa nøgd, t.d. ein ávísan prosentpart av samlaðu vatnnøgdini o.a.

Eisini verður greitt ásett, at loyvi at gagnnýta grundvatn ikki sleppur loyvishava undan at fáa til vegar øll onnur neyðug loyvi eftir aðrari lóggávu, t.d. byggiloyvi, umhvørvisgóðkenningar o.a.

At enda verður ásett, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áseta gjald fyri loyvi at gagnnýta grundvatn. Talan kann bæði vera um gjald fyri sjálva loyvisviðgerðina, eins og gjald kann verða tikið fyri rættin at gagnnýta vatnið. Hetta er sama skipan, sum er galdandi í alivinnuni.

**Til § 6**
Ásett verður, at loyvi at gagnnýta grundvatn fellur burtur, um tað ikki verður brúkt í einum tíðarskeiði upp á 12 mánaðir á rað, ella um ásetingarnar í hesi løgtingslóg ella í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, ikki verða hildnar.

Harumframt kunnu loyvi verða tikin aftur, um ásetingar í lógini ella treytirnar í loyvinum ikki verða hildnar.

Henda áseting hevur til endamáls at forða fyri, at veitt loyvi ikki verða gagnnýtt.

**Til § 7**
Staðfest verður, at eitt felag, sum hevur fingið loyvi at gagnnýta grundvatn eftir §§ 3- 4, bara kann lata ella selja loyvi, um landsstýrismaðurin frammanundan hevur góðkent hetta.

Til tess at tryggja, at gagnnýtslan framhaldandi er burðardygg og annars fer fram eftir teimum treytum, sum eru galdandi fyri nýtsluna, verður ásett, at treytirnar í § 5 galda á sama hátt, hóast vatnið verður selt ella latið øðrum at brúka. Ítøkiliga merkir hetta, at tann, sum keypir ella á annan hátt heilt ella partvíst yvirtekur rættin at gagnnýta vatnið, skal lúka tær treytir, sum myndugleikin setir teimum.

**Til § 8**

Ásett verður, at loyvi eftir § 2, § 3 ella § 4, stk. 1-2, verður latið fyrstu ferð fyri í mesta lagi 20 ár. Síðani kann loyvið verða longt upp í 5 ár í senn. Hetta eru vanligar ásetingar, tá ið ræður um loyvisvirksemi av hesum slag.

Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 6.

**Til § 9**
Ásett verður, at almennir myndugleikar kunnu seta upp smærri útbúnað til tess at gagnnýta grundvatn á privatum grundstykki uttan endurgjald, um tað kann gerast uttan stórvegis ampa fyri eigaran. Somuleiðis verður ásett, at tann, sum hevur heimild at seta upp útbúnaðin, eisini hevur heimild at gera neyðugar fyrireikandi uppmátingar, annað tøkniligt fyrireikingararbeiði og aðrar kanningar.

Endurrindað verður fyri skaðar, ið standast av arbeiðinum. Fæst ikki semja um endurgjaldið, ásetur Jarðfeingi upphæddina. Avgerðin hjá Jarðfeingi kann kærast til landsstýrismannin. Eigarin skal hava boð um arbeiðið 4 vikur undan, at arbeiðið byrjar, og í seinasta lagi 2 vikur undan, at arbeiðið skal byrja, kann eigarin mótmæla, um mett verður, at ætlanin fer at hava við sær so stóran fíggjarliga miss, at talan er um ognartøku eftir § 10. Víst verður til viðmerkingarnar til § 10.

**Til § 10**
Um almannagagnið krevur tað, verður landsstýrismanninum heimilað, móti fullum endurgjaldi, at ognartaka lendi til útbúnað o.a., sum er neyðugt fyri at gagnnýta grundvatn.

Slík ognartøka skal gerast eftir reglunum í Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.

**Til § 11**
Landsstýrismaðurin kann leggja heimildir sínar eftir hesi løgtingslóg til stovn undir landsstýrinum. Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir løgtingslógini til annan myndugleika undir ráðnum, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um rættin at kæra avgerðir myndugleikans, m.a. at avgerðirnar ikki kunnu leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika, og um rættin hjá myndugleikunum at taka upp aftur eitt mál, eftir at kæra er komin inn.

Ásetingin ger tað møguligt heilt ella partvíst at skerja kæruatgongdina, hóast atgongd til at kæra eina avgerð er grundað á tveyrættarstigsskipanina. Reglan gevur somuleiðis møguleika at áseta, hvussu kærast kann, hvussu kærur skulu viðgerast, um freist, form og innihald, ella hvussu kæran skal latast inn.

Heimild er eisini fyri remonstratión, t.e. at tann myndugleiki, sum hevur tikið avgerð, sum kann kærast, kann taka málið uppaftur og møguliga taka aðra avgerð, sjálvt um kæra er latin inn. Myndugleikin kann sostatt taka nýggja avgerð, sum gevur kæraranum heilt ella partvíst viðhald, uttan at málið skal leggjast fyri kærumyndugleikan. Nýggja avgerðin kann tá kærast til kærumyndugleikan.

**Til § 12**

Ásett verður, at tann, ið tilvitað tekur burtur, avlagar ella løstar merkingar o.a., sum verður gjørt í sambandi við arbeiði, nevnt í § 9, verður revsaður við sekt, um ikki strangari revsing er uppiborin eftir revsilógini

**Til § 13**
Ásett verður, at um loyvishavi, sum við heimild í løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum, hevur fingið loyvi at gagnnýta vatnið, sum rennur ella kann vinnast burtur úr rivum og øðrum lekum inni í sumbiarbergholinum, søkir um at leingja loyvistíðarskeiðið, skal umsóknin viðgerast eftir reglunum í hesi løgtingslógini.

**Til § 14**
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Somuleiðis verður ásett, at tá øll loyvi, ið eru givin við heimild í løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum, eru endurnýggjað, latin inn aftur ella tikin aftur, verður løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum sett úr gildi við kunngerð landsstýrismansins.

Henda seinna ásetingin er grundað á, at nýggja løgtingslógin um grundvatn løgskipar alla gagnnýtslu av grundvatni, eisini ta í sumbiarbergholinum. Løgtingslógin um vatnið í sumbiarbergholinum verður kortini verandi í gildi, tí hon skipar viðurskiftini hjá teimum, sum í løtuni hava loyvi at gagnnýta tað vatnið. Tá hesi loyvi eru endurnýggjað, latin inn ella tikin aftur, verður løgtingslógin um vatnið í sumbiarbergholinum sett úr gildi. Hetta verður gjørt við kunngerð landsstýrismansins.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá.....
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: